## Norskur bispur tapti 70 milliónir

Í Noregi hevur kjak tikið seg upp um tann í forvegin stranga lógin um spæl og bookmaking skal strammast enn meiri. Orsøkin er, at ein bispur í landinum er farin á húsagang eftir at sonur hansara hevur spælt fyri fleiri enn 70 milliónir krónur á internetinum. Í fjórðastørsta býnum í Noregi, Stavanger, er bispurin og farin á heysin eftir at hann saman við konuni hevur átikið sær eina millióna skuld. Tey hø'vdu lánt peningin til sonin í teirri trúgv, at hann gjørdi íløgur í KT-fyritøkur. Men tað vórðu teir bara ikki. – Tað er ein ræðuligur skelkur at sanna, hvat peningurin í veruleikanum varð nýttur til, sigur Ernst Baasland, bispur við NRK.



# HB'arin, sum bleiv Føroya løgmaður

**Tað nærmasta Kaj Leo Johannesen kemur bóndalívi, er tá hann gongur á fjalli í Mykinesi av og á. Annars er komandi løgmaður ein glaður fótbóltsspælari, vinnulívsmaður, pápi og formaður í Sambandsflokkinum**



*Kaj Leo Johannesen limaði seg inn í Sambandsflokkin í 1988, og seks ár seinni stillaði hann upp til løgtingsvalið í 1994. Í 1996 var bæði fólkatingsval og býráðsval í Havn, og Kaj Leo varð uppstillaður til bæði valini. Hann var tá valdur í Tórshavnar býráð. Á heysti 2001 stillaði hann upp til fólkatingsvalið og til løgtingsvalini í 2002 og 2004 kom hann inn og við seinasta valg, fekk hann 641 atkvøður.*

SAMANPETTAÐ VANGAMYND

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tíðliga í morgun fingu føroyingar boðini um, at komandi løgmaður landsins verður Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsflokksins.

Hesin ungdommiligi og smílandi HB'arin, vinnulívsmaðurin og familjupápin, sum hevur stríðst seg upp á tindarnar í føroyskum politikki, í einum flokki, har tað ikki altíð gongur friðarliga fyri seg, og har høvdingarnir eru fleiri.

Hóast vit kundu hugsað okkum eitt djúphugsið prát við høvuðspersónin í morgun, so lá tað ikki fyri, tí hann var farin til songar aftaná drúgvu samgongusamráðingarnar, við boðum um at fáa frið til einaferð seinnapartin.

Men tá er prent-rotatiónin við Sosialinum longu steðgað, og bløðini vónandi fesk í sølubúðunum.

So, við støði í tí, sum vit kundu leita fram, pettaðu vit kortini eina vangamynd saman av menniskjanum handan komandi løgmann:

Kaj Leo Holm Johannesen, sum er fulla navnið, er føddur 28. august í 1964, og hann er sostatt 44 ár. Foreldrini eru Leo Hans Johannesen, sum doyði í 1991, og Karin Holm Johannesen, bæði ættað úr Mykinesi. Karina kenna fólk kanska úr Tilhaldinum, har hon er sera virkin. Kaj Leo vaks upp bæði í vestur- og eysturbýnum - fyrstu 12 árini í Brøttulíð, og næstu 14 árini í Tjarnarlág.

### Familjan..

Í dag er Kaj Leo Johannesen giftur við Jórun Johannesen, og eiga tey synirnar Heina, 8, Jákup 7 og Jónas, 2. Tey búgva á Teigi í vesturbýnum í Havn.

Páparnir hjá Kaj Leo og Jórun andaðust báðir í syndarligum vanlukkum: Pápi Kaj Leo út fyri Mykines tann 14. oktober í 1991, og pápi Jóruna í Trinidad tann 14. apríl í 1983, har hann var við Teistanum sum telegrafistur.

### .. og ítrótturin

Vit hava eisini kannað okkum fram til, at hann er var fyrsti málverji hjá HB í 1984-2000, og at hann við 299 dystum, er tann spælarin, sum hevur spælt næstflestu dystirnar fyri 1. liðið í søguni hjá felagnum. Virknu fótbóltsárini vann hann trý FM-heiti og ikki færri enn átta ferðir var hann steypavinnari. Eisini var hann við í landsliðshópinum árini 1988 til 1984, nógva partin sum eykamaður hjá Jens Martini Knudsen, men tað gjørdist eisini til fýra altjóða skrásettar A-landsdystir.

Umframt fótbólt, hevur Kaj Leo Johannesen eisini spælt eitt sindur av hondbólti.

### .. og menninir

Vit hava eisini frætt, at hvønn morgun situr komandi løgmaður spillnakin og ornar verðinssituatiónina saman við hópin av ø(ð)rum havnarmonnum í hitarúminum í svimjihøllini í Gundadali.

Og kona hansara, Jórun, og kona Bárð Nielsen, fyrrverandi landsstýrismann, Rakul eitur hon, eru barndómsvinkonur.

**Kaj Leo Johannesen fyllir sama dag sum Nikolai prinsur, fyrstføddi hjá danaprinsi Joakim**

### .. og "bóndarnir"

At hjartað hjá komandi løgmanni bankar fyri bóndunum er ongin ivi um millum fólk.

Men tað nærmasta hann sjálvur kemur bóndalívi, er, tá hann er á fjalli á fedranna oyggj, Mykinesi, av og á.



*Løgmansfamiljan á ólavsøku. Yngsti sonurin vantar á myndini*



*Sjálvandi eru synirnir eisini rættir HB-arar*